# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Vit kunnu altíð tosa við Barrack Obama, tí hvørgin okkara er valds- ella krígsprofetur*
*Fidel Castro*

# Ófriðurin í Grikkalandi kann breiða seg



*31 handlar og níggju bankar fóru upp í royk gjáranáttina*

*Mynd: Polfoto*

Grikkaland skelvir av ófriði, eftir at ein 15 ára gamal drongur doyði av skotum frá einum løgreglumanni

Túsundtals ungdómar løgdu á bilar, handlar og bankar í Athen í nátt, og hóast tað var friðarligt í morgun, stúra myndugleikarnir fyri, at ófriðurin kyknar aftur í dag, og at hann fer at breiða seg til aðrar býir.

Ungdómarnir eru í øðini um, at ein 15 ára gamal drongur doyði av skotum frá einum løgreglumanni leygarkvøldið. Tann 15 ára gamli hevði saman við øðrum tveitt grót og brandbumbur eftir einum løgreglubili í Exarchia-býarpartinum í Athen, har samanstoytir millum ungdómar og løgregluna eru rættiliga vanligir. Men leygarkvøldið fór ein av løgreglumonnunum úr bilinum og lat nøkur skot av. Eitt av skotunum rakti ein 15 ára gamlan drong í bringuna, og hann doyði seinni.

Í gjár komu fleiri túsund fólk saman í Athen at taka lut í einari mótmælisgongu ímóti løgregluni. Prokopis Pavlopoulos, innanríkisráðharri, heitti inniliga á mótmælisfólkið og bað tey ikki leypa framav, men áheitanin var nyttuleys.

Tað byrjaði í býnum Thessaloniki, har ungfólk settu eld á bilar og bygningar, og løtu seinni kyknaði ófriðurin í Athen, har fólk settu eld á bilar og lupu á handlar og bankar. Samstundis skrivaðu grikskir fjølmiðlar, at ófriðurin hevði breitt seg til fleiri býir kring landið og til oyggjarnar Korfu og Kreta.

Prokopis Pavlopoulos, innanríkisráðharri, hevur sagt, at løgreglumaðurin, sum rakti tann 15 ára gamla drongin, er tikin, og at hann fær harða revsing, kann tað prógvast, at hann leyp framav. Innanríkisráðharrin hevur boðið sær til at fara frá, men tað hevur Costas Karamanlis, forsætisráðharri, sýtt honum.

# Stein Bagger kann fáa átta ára fongsul

**Tað kostar at svika fyri meiri enn eina milliard krónur, og tí kann danski vinnulívsmaðurin Stein bagger vænta sær langan fongsulsdóm**



*Stein Bagger kann vænta sær nógv ár handan rimarnar*
*Mynd: Polfoto*

Verður stjórin í fyritøkuni IT Factory dømdur sekur í so umfatandi sviki, sum danska ákæruvaldið sigur hann hava framt, kann hann vænta sær nógv ár handan rimarnar. Í Danmark kunnu fólk fáa fongsul í eitt ár og seks mánaðir fyri tað, sum verður rópt vanligt svik, men hesa greinina kemur málið við Stein Bagger ikki undir.

- Her er talan um so grovt svik, at Stein Bagger kann ákærast eftir greinini um grovt ella endurtikið svik, og so kann hann fáa upp í átta ára fongsul, sigur Søren Friis Hansen, professari, við danska kringvarpið.

Stein Bagger hvarv í Dubai í síðstu viku, og aftaná kom fram, at hann hevði svikað fyri í hvussu er 1,2 mia. krónur sum stjóri í felagnum IT Factory, og felagið fór á húsagang alt fyri eitt. Hann bleiv eftirlýstur ígjøgnum Interpol, og fyrrakvøldið kom hann sjálvur á eina løgreglustøð í Los Angeles. Haðani hava donsku myndugleikarnir fingið at vita, at maðurin verður sendur til Danmarkar sum skjótast.

Svikið hjá Stein Bagger hevur risastór tap við sær. Størsta einstaka missin eigur Danske Bank, sum ætlandi missir einar 350 milliónir krónur. Fleiri aðrir danskir bankar missa eisini pengar. Eisini fleiri privatpersónar missa nógvar pengar av svikinum og húsaganginum. Ein teirra er sjónleikarin og skemtarin Finn Nørbygaard, sum ætlandi missir alt, sum hann eigur.

Men málið við IT Factory fær væntandi ikki bara avleiðingar fyri stjóran. Fleiri eygleiðarar í Danmark siga, at málið avdúkar, at tað er neyðugt at broyta verandi lóggávu á ávísum økjum. Eitt nú er neyðugt at herða krøvini um virksemið hjá vinnufelagsnevndum og grannskoðaravirkjum, tí yvirhøvur er semja um, at bæði nevndin í IT Factory og grannskoðaravirkið hjá felagnum áttu at havt avdúkað svikið. Eygleiðararnir undrast eisini á, at Danske Bank ikki varnaðist, hvat var á vási.

## STUTT SAGT

### Eingin roykur í Hvítu Húsunum

Barrack Obama vissaði fyrrakvøldið hyggjararnar hjá sjónvapinum NBC um, at hann fer ikki at roykja inni í Hvítu Húsunum, tá hann hevur tikið við forsetaembætinum. Obama var stórroykjari, men legði næstan av, tá hann fór undir valstríðið. Í samrøðuni við NBS viðgekk hann, at hann stríðist við at leggja av, men at hann hevur fest sær í nakrar ferðir í seinastuni.

- Jú, eg eri fallin fyri freistingini nakrar ferðir, segði hann við sjónvarpið. Hann legði tó afturat, at sjálvur heldur hann, at tað hevur gingið væl við royndini at leggja av, soleiðis sum umstøðurnar hava verið.

-Eg kann í hvussu er lova tykkum, at eg fari ikki at roykja í Hvítu Húsunum, segði tann komandi forsetin.

### Sarkozy og Dalai Lama hildu fund

Myndugleikarnir í Kina eru sera misnøgdir við, at fanski forsetin, Nicolas Sarkozy, hitti andaliga leiðaran hjá tibetanum, Dalai Lama, leygardagin. Kinesisku myndugleikarnir siga, at avgerðin hjá forsetanum at hitta Lama er ein háðan ímóti kinesisku tjóðini og kann skaða viðurskiftini landanna millum.

Nicolas Sarkozy hitti Dalai Lama í polska býnum Gdansk, hagar teir vóru komnir at hátíðarhalda, at 25 ár eru liðin, síðani Lech Walesa, fyrrverandi oddamaður í Solidaritet og fyrrverandi forseti í Póllandi, fekk friðarheiðursløn Nobels. Í viðmerkingini úr Beijing sigur kinesiska stjórnin, at viðurskiftini í Tibet eru eitt kinesisk innanríkismál, og tí eigur franski forsetin ikki at umrøða tey viðurskiftini við ein politiskan útlagnan sum Dalai Lama.

Á einum tíðindafundi royndi franski forsetin at sissa kinesisku stjórnina við at siga, at fundurin við Dalai Lama snúði seg als ikki um viðurskifti, sum hava við stjórnina í Beijing at gera.